## Færri sjúkrasystrar geva hægri løn

Í Noregi er slíkur eftirspurningur eftir sjúkrasystrum, at lønirnar fara at hækka rættiliga nógv í framtíðini. Fyri at nøkta tørvin mugu sjúkrahús og kommunur nevniliga hækka lønir teirra, um tað skal eydnast at lokka útbúgvið heilsustarvsfólk til sjúkrahúsini. Víst verður á, at byrjunarlønin hjá norskum sjúkrasystrum er 281.500 kr., meðan ein lektari í skúlaverkinum fær 50.000 kr. meiri um árið. Støðan í Noregi er ikki góð, tí eini 70 % av kommununum eru undirmannaðar av sjúkrasystrum. Hetta gevur meiri arbeiði til ta einstøku sjúkrasytrina, og tað eru ikki allar sum fara at orka tað í framíðini.



## Føroyskur samkomu- leiðari vitjar

Vikuskiftið 12. til 14. oktober verða vikuskiftisfundir í Kelduni í Skálafirði har føroyski samkomuleiðarin í Danmark, Bergur Skovgaard fer at tala. Bergur hevur virkað nógv innan samkomur í Føroyum, og hevur síðani hann flutti til Danmarkar verið millum annað samkomuleiðari í Svendborg og í Århus. Umfram mótini í samkomuni fer hann eisini at hava eitt serstakt tiltak fyri vinnulívsfólk. Hetta verður leygardagin 13. oktober kl. 17.

# Magi'in liggur í orðunum

**Leygardagin var eitt serstakt skeið fyri deknar hildið í Vesturkirkjuni í Havn. Endamálið var at læra hesi rættan upplestur. - Orðini hava størsta týdningin. Í teimum liggur magi'in í boðskapinum, varð sagt**

KIRKJUTÆNARAR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Eitt er at standa á kirkjugátt og lesa upp, og eitt annað frammanfyri øðrum, tá ein er á skeið. Deknar fingu leygardagin fleiri hent amboð at arbeiða víðari við í tænastu teirra í kirkjunum*

*Mynd: Snorri Brend*

**Vesturkirkjan:** - Hygg. Les líka hetta pettið einaferð aftrat um kærleikan, og hav so eitt gott smíl uppá. Hetta er jú gleðiboðskapurin!

Ein av undirvísarunum, Kristina S. Hansen lurtar við áhuga eftir tí eina luttakaranum, sum er í ferð við at lesa upp eitt petti úr Bibliuni.

Frammanundan hava luttakararnir fingið ein tekst handaðan, sum tey skuldu lesa upp frammanfyri hinum. Í hesum føri var tað 13. kapittulin í 1. Korintbrævinum, tann sonevndi Kærleikskapittulin.

- Hetta er ein ringur tekstur at lesa upp, tí her eru so nógvar myndir í. Tí er sera týdningarmikið at hesar myndirnar koma týðiliga fram, greiðir Kristina frá fyri skeiðluttakarunum.

Skeiðið var skipað við undirvísing avspenning, andadrátti og við upphiting av røddini. Seinnapartin var upplestur í bæði av bundnum og óbundnum teksti, og endaði við at tey sluppu at lesa upp fyri hvørjum øðrum.

### Kærleikin er sterkur

Luttakararnir eru helst vanir við at standa á eini kórsgátt, har tey lesa annaðhvørt inngangsbøn, bíbliutekstir ella eina skrivaða prædiku úr eini lestrarbók.

Nú ið áhoyrarnir vóru bæði færri og vóru komnir higar í somu ørindum, var ikki lætt at fáa alt at ganga upp í eina hægri eind:

At lesa upp bæði sannførandi, týðiliga, spakuliga og greitt, hava eygnasamband við áhoyrararnar, og haraftrat soleiðis, at áhoyrararnir ella kirkjufólkið skilja boðskapin í tekstinum.

Undir kønari leiðslu av Kristinu og systrunum Riu og Súsannu Tórgarð fingu luttakarnir nøkur amboð at brúka í tænastu teirra sum deknar í føroysku kirkjunum.

- Nú las tú upp, at kærleikin er langmóðigur, góðviljaður, øvundar ikki og blæsur seg ikki upp. Men, her er jú talan um sera sterkar myndir sum Paulus brúkar í brævinum.

- Tí er tað sera umráðandi, at tú líkasum letur hesar myndirnar hanga í luftini eitt sindur og ikki skunda tær víðari. Tá skilja fólk betur, hvussu stórur hesin kærleikin er, greiðir Kristina frá.

Luttakarin lurtar væl eftir ráðunum, og roynir enn einaferð at lesa upp henda sigandi tekstin úr Nýggja Testamenti.

### Ikki missa boðskapin á gólvið

Tað er ikki so lætt, tá hini øll sita og fylgja væl við. Tað er heitt í rúminum, tá øll sita soleiðis og konsentrera seg 100%.

"Men nú verða tey verandi, trúgv, vón og kærleiki, hesi trý, men størstur av teimum er kærleikin", lesur hon upp eftir besta førimuni.

- Steðga eitt lítið sindur, brýtur Kristina hana av einaferð aftrat.

- Ansa eftir, at tú ikki fellur í tónalagnum í endanum av setninginum "men størstur av teimum er kærleikin". Um ein ger tað, so er tað eins og vit missa sjálvan boðskapin niður á gólvið.

- Tað er jú kærleikIN, ið alt snýr seg um. Hann hevur jú ongan enda, og tí mugu vit eisini fáa tað sagt við tey sum lurta!

Luttakarin roynir enn einaferð. Nú er líkt til, at hon fær samantvinna boðskapin í tekstinum saman við øllum tí, sum tey hava lært fyrri um dagin.

Luttakarnir sita og samgleðast við henni um úrslitið. Øll fáa tey nakað burturúr skeiðnum.



*Deknar kring landið lurta við áhuga og taka ímóti tí, sum undirvísararnir - í miðjuni ein teirra, Súsanna Tórgarð - høvdu at bera fram*

*Mynd: Snorri Brend*

> *"Tað er jú kærleikinIN, ið alt snýr seg um. Hann hevur jú ongan enda, og tí mugu vit eisini fáa tað sagt við tey sum lurta*

## Spennandi samstarv um upplestur

Skeiðið í upplestri er ein liður í einum spennandi samstarvi millum tveir so ymiskar partar sum Felagið fyri Kirkjuráðslimir og Tjóðpall Føroya.

Her var í øllum lagt upp til at gera deknar og prestar tilvitaðar um, hvat tað vil siga at bera fram eina prædiku ella lestur, ella við at lesa tekstir úr Bíbliuni.

At standa fyri skeiðnum vóru undirvísarar í serflokki, og sum øll høvdu drúgvar royndir í bæði upplestri og tí at standa á palli til ein leik. Hesi trý vóru Kristina S. Hansen, og systrarnar Ria og Súsanna Tórgarð.

Dagurin var skipaður í ávís evni, har byrjað varð við ymiskum venjingum fyri røddina, áðrenn luttakarnir sjálvir sluppu at lesa upp tekstir fyri hvørjum øðrum.

Tað skiltist á teimum, at hetta hevði verið ein góður dagur. Tey, ið enn ikki hava verið á skeiðnum, fáa ein nýggjan møguleika leygardagin í næstu viku, tá tað verður tikið uppaftur.


# Takk



Takk til alle som møtte opp på min 80 årsdag.
Hjertelig takk til mine to kjempeflotte svigerdøtre m/fam. for den store overrakselsesfesten, som ble holdt i Frelsesarméen. Takk til alle som holdt taler. Takk til M.C. Restorff for sangen han hadde diktet til meg.
Takk for blomster og gaver, telegram og oppringninger.

**Ruth Kjeld**